## Nýttu MP3-spælara til stuldur

Maxwell Parson hevur skelkað allan enska bankaheimin við einum higartil ókendum hátti at stjala pening. Saman við sínum harkaliði nýtti hann nevnliga MP3 spælarar til at taka upp elektronisku signalini frá eini sjálvtøku. Tá signalini vórðu umsett til tekst, høvdu Parson og felagar hansara øll neyðug data, og tí var eingin trupulleiki at stjala til samans 2 mió kr. frá ymsum kredit-kortum. Alt fekk tó ein enda, tá Parson av tilvild varð steðgaður, tí hann hevði brotið ferðslulógina. Tá kom løgreglan fram á følsk kredit-kort, og ein rannsakan í húsum hanara vísti seinni, at maðurin hevði 18 onnur kort heima, umframt útgerð at framleiða hesi við. Í rættinum varð Parson dømdur 32 mánaða fongsulsrevsing.

## Kaupthing hóttir Ekstra-Bladet

Seinastu vikurnar hevur danska Ekstra-Bladet havt eina røð av greinum um íslendskan búskap. Millum annað verður her sagt, at Kaupthing hevur gjørt sær dælt av einum ávísum modelli fyri skattaundandrátt, umframt at bankin hevur samband við hvíttvasking av svørtum peningi úr Russlandi. Nú hevur bankin svarað aftur, og umvegis advokatin hevur Kaupthing nú sent bræv til Ekstra-Bladet. Har sigur blaðstjórin, Bent Falbert, at blaðið einki skeivt hevur skriva, og at tað tí er ivasamt, hvørt tey fara at laga seg eftir krøvunum frá Kaupthiing.

Fiskavirkisvinnan:

# Enn størri trupulleikar at fáa fólk

**- Verandi ættarlið í fiskavirkisvinnuni ynskir ikki, at børn teirra skulu arbeiða í fiskivinnuni á landi – og tey ungu, sum eru komandi ættarlið á arbeiðsmarknaðinum, ynskja heldur ikki at arbeiða í hesi vinnu, sigur Dennis Holm, granskari**



*Sum heild siga fólk í fiskavirkisvinnuni (77%), at tey trívast væl og heilt væl, men kortini hevði ein stórur partur tikið av øðrum arbeiðstilboði, um hetta stóð teimum í boði. Tað vísir kanningin hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning*

FISKAVIRKISVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í 2003 gjørdu Olga Biskupstø og Bjarni Mortensen eina kanning millum øll, sum gingu í 9. flokki og í 3. flokki í miðnámsskúlunum. Tilsamans vórðu 998 spurnarbløð send út, og av hesum vórðu 899 svaraði. Soleiðis var svarprosentið heili 90%.

- Henda kanningin vísir, at bert 3,2% av teimum ungu ynskja at arbeiða innan fiskivinnuna á landi. Býtt á kyn, er talan um, at einans 5,2% av dreingjunum og 1,7% av gentunum ynskja, at teirra framtíðarstarv skal verða innan fiskivinnuna á landi.

Hetta vísti Dennis Holm, granskari, eisini á í framløgu síni í Vinnuhúsinum í síðstu viku.

Hann segði, at heili 91% av teimum, sum vóru við í kanningini hjá Olgu og Bjarna, svaraðu, at tey ætla at fáa sær eina útbúgving. Hinvegin søgdu bert 1% seg ikki ætla at fáa sær eina útbúgving. 8% vistu ikki.

Dennis Holm vísti í síni niðurstøðu á, at nútímans samfelagið leggur upp til, at tann einstaki skal skapa eitt so gott lív fyri seg sjálvan sum gjørligt. Hendan stremban røkkur út um bygdarmarkið - og eisini út um landoddarnar.

- Í kanningini svara nógv – væl fleiri gentur enn dreingir, at tey ynskja at búseta seg uttanlands, tá ið tey eru liðug við at útbúgva seg.

Tey allar flestu ungu ynskja at nema sær eina útbúgving, soleiðis at tey kunnu fáa eitt arbeiði, sum gevur góða løn og sum førir við sær spennandi og avbjóðandi arbeiðsuppgávur.

- Hetta merkir í nógvum førum frával av arbeiði innan framleiðsluvinnurnar og somuleiðis eitt frával av teimum lokalsamfeløgum, sum eru fiskivinnusamfeløg, segði Dennis Holm.

Hann segði, at kanningarnar, sum Granskingardepilin og Olga saman við Bjarna hava gjørt, vísa, at ein munandi partur av teimum, sum arbeiða í fiskivinnuni á landi ynskja annað arbeiði – hóast trivnaðurin er góður.

- Verandi ættarlið í fiskavirkisvinnuni ynskir ikki, at børn teirra skulu arbeiða í fiskivinnuni á landi – og tey ungu, sum eru komandi ættarlið á arbeiðsmarknaðinum, ynskja heldur ikki at arbeiða í hesi vinnu.

Dennis Holm segði, at fiskivinnan á landi í framtíðini fer at fáa enn størri trupulleikar við at fáa føroyska arbeiðsmegi á virkini.

- Kanningin hjá okkum og kanningin hjá Olgu Biskupstø og Bjarna Mortensen koma við áhugaverdum niðurstøðum.

Men hesar kanningar seta eisini fleiri nýggjar spurningar, segði Dennis Holm, granskari.

at 5% av arbeiðsfólkunum hava arbeitt í fiski longri enn 25 ár, og 5% hava eisini verið á sama fiskavirki longri enn 25 ár.

Men kanningin vísir eisini, at fólk sum heild arbeiða leingi á sama fiskavirki.

43% hava nevniliga arbeitt á sama virki longri enn 5 ár, og 19% hava verið millum 6 og 10 ár.

Og tó; 27% av arbeiðsfólkinum hava verið á sama virki í stytri enn 2 ár.

### Annað arbeiði

Tølini í kanningini vísa eisini – kanska eitt sindur óvæntað, at heili 77% siga, at tey trívast heilt væl og væl á fiskavirkinum, meðan bert heilt fá siga, at tey trívast illa og heilt illa.

Tað eru nevniliga 2% sum siga seg trívast illa og 1% sum siga, at tey trívast heilt illa.

Hóast tølini vísa, at fólk sum heild trívast væl á fiskavirkjunum, halda kortini eini 600-800 fiskafólk, at tey kundu hugsað sær annað arbeiði, um hetta stóð teimum í boði. Hetta er eini 39% av samlaða talinum, sum liggur um eini 1500-2000 fólk. Vert er eisini at leggja til merkis, at í kanningini siga 35%, at tey vita ikki, um tey høvdu tikið av einum øðrum arbeiðstilboði – og 24% siga nei.

Kanningin vísir, at tað serliga eru tey ungu millum 20 og 29 ár og ung, sum eru 20 ár og yngri, sum kundu hugsað sær annað arbeiði.

Av teimum, sum eru yngri enn 20 ár, siga 50%, at tey høvdu tikið av øðrum arbeiðstilboði, og 54% av teimum, sum eru millum 20 og 29 ár, siga tað sama.

### Eldru støðast

Longur uppi í aldursbólkunum eru fólk ikki so avgjørd um onnur arbeiðstilboð.

Millum fólk, sum eru í aldrinum 50-59 ár, siga 35,8%, at tey høvdu ikki tikið av øðrum arbeiðstilboði, 27,4% siga, at tey høvdu – og tey seinastu 36,8% siga seg ikki vita.

Tey, sum eru 60 ár og eldri, eru uppaftur meira avgjørd um, at tey ynskja at vera verandi í fiskiídnaðinum; 59,3% siga, at tey høvdu ikki tikið av, 20,9% siga seg ikki vita – og 19,8% siga, at tey høvdu tikið av øðrum arbeiðstilboði, um hetta stóð teimum í boði.

Í kanningini vórðu fólk eisini spurd, um tey vænta at arbeiða í fiskavirkisvinnuni um 5 ár.

Samanlagt siga 31% ja, 33% nei – og 38% siga, at tey vita ikki.

Taka vit tey ungu burtur úr, er eingin ivi. Tey ætla sær ikki at vera verandi í fiskavirkisvinnuni um 5 ár.

79,4% av teimum, sum eru 20 ár og yngri, siga, at tey vera ikki í fiskavirkisvinnuni um 5 ár. Bert 2% siga, at tey vænta at vera verandi – eisini um 5 ár. Í aldursbólkinum 20-29 ár eru tølini eisini rættiliga greið; har siga 49,3%, at tey ikki ætla sær at vera í fiskavirkisvinnuni um 5 ár, meðan 13% vænta at vera verandi.

Tann størsti bólkurin, sum væntar at vera verandi í fiski um 5 ár, eru tey, sum eru millum 50 og 59 ár; har siga 61,3% ja og 7,2% nei.

### Ikki í fisk

Ein annar áhugaverdur spurningur, sum Granskingardepilin fyri Økismenning setti sær fyri at kanna er, um arbeiðsfólk í fiskavirkisvinnuni ynskja, at teirra børn skulu arbeiða í hesi vinnu.

Og tað gera tey ikki.

Her svaraðu bert 7% ja, 62% nei – og 18%, at tey vita ikki.

> *Í kanningini vórðu fiskafólk spurd, um tey ynskja, at teirra egnu børn fara í fiskavirkisvinnuna. Her svaraðu bert 7% ja, 62% nei – og 18%, at tey vita ikki.*
>
> (Kanningin hjá Granskingardeplinum)

> *Av teimum, sum eru yngri enn 20 ár, siga 50%, at tey høvdu tikið av øðrum arbeiðstilboði, og 54% av teimum, sum eru millum 20 og 29 ár, siga tað sama"*
>
> (Kanningin hjá Granskingardeplinum)